

*Ellintur Abrahamsen og Karsten Hansen skrivaðu beint eftir miðnátt týskvøldið undir semjuna, sum endaði drúgva verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hampiliga væl nøgdir

**Limirnir í Skipara og Navigatørgfelagnum, sum sigla við vaktarskipunum, eru vorðnir tænastumenn, nú nýggjur sáttmáli er undirskrivaður. Lønarhækkingin er 9,5 % í tvey ár, umframt aðrar smærri hækkingar á ymsu økjunum**

SEMJA
*Edvard Joensen*

Verkfallið, sum hevur rakt strandfaraskipini, vaktar- og bjargingarskipini eins og Magnus Heinason, var av, tá semja varð undirskrivað mikumorgunin klokkan knapt hálvgum eitt. Góðan hálvan tíma seinni fór vaktarskipið Tjaldrið út um molan. Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum kundi ynskt meira til smærru strandfaraskipini, meðan landstýrismaðurin við fíggjarmálum staðfestir, at semjan var dýrari, enn hann ætlaði.

Semjan gevur limunum í Skipara- og Navigatørfelagnum eina lønarhækking upp á 7% tann 1. mars í ár, og eina hækking upp á 2,5% tann 1. mars komandi ár. Umframt verða vaktargjøldini hækkað samstundis.

Skipararnir í bólki I á vaktar- og bjargingarskipunum eins og á strandfaraskipunum fáa eina viðbót upp á 7.500,- krónur um mánaðan aftur at føstu lønini, og um broytingar verða gjørdar í arbeiðs- og vaktarskipanini, sum mundandi broyta føstu viðbótina hjá stýrimonnunum, verða samráðingar millum partarnar um broytingar í nevndu viðbót.

Ymsar umflokkingar eru eisini gjørdar, eins og skiparar og stýrimenn á vaktar- og bjargingar-skipunum eru vorðnir tænastumenn.

Eitt sindur av ósemju hevur staðist um eina dagfesting, sum skuldi avgera, nær ein seravtala kom í gildi. Tann dagurin er nú settur til at vera, tá ein gerðarættur hevur viðgjørt nevnda mál, ella í seinast lagi tann 1. juli í ár.

Bæði Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, og Karsten Hansen, landstýrismaður við fíggjarmálum, siga, at teir kunu liva við sátmálanum, hóast teir hvør í sínum lagi kundu hugsað sær okkurt øðrvísi.

Karsten Hansen fegnast um, at verkfallið er liðugt, men sigur samstundis, at semjan er dýrari enn hann hevði vónað, at honn fór at verða.

– Vit hava gjørt sáttmálar við almenna arbeiðsmarknaðin upp á 9,5 prosent, meðan hendan semjan er heldur dýrari enn tað, við tað, at ymsar seravtalur hanga við, samstundis sum generella lønarhækkingin er 9,5 prosent, sigur Karsten Hansen.

Ellintur Abrahamsen staðfestir, at felagið hevur fingið somu lønarhækking, sum onnur hava fingið, umframt eina bólking, sum treytað verður av einum gerðarrætti.

Hann fegnast mest um, at tænastumannasetaninar eru komnar upp á pláss, eins og hann nevnir, at nú eru yvirmenninir á vaktar- og bjargingarskipunum báðum líkastillaðir.

Hinvegin er hann ikki nøgdur við, at teir ikki fingu lyft tey smáu strandfaraskipini hægri upp. Tey eru til dømis Barsskor, Másin og Ritan.

– Vit høvdu vónað, at teir fóru at hava eitt sindur av samkenslu við teimum, men har var einki at heinta, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum.

Hann sigur, at teir beinanveg, skrivað var undir, ringdu til fleiri av limum sínum og boðaðu frá, at nú er klárt at sigla.

Vaktar- og bjargingarskipini fóru út beinanveg, og formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum væntaði, beint eftir at hann hevði skrivað undir, at strandfaraskipini fóru at sigla eftir ferðaætlanini beinanveg mikumorgunin.

# Nú fækka møguleikarnir

**Løgmaður segði týsmorgunin, at nú fækka møguleikar hansara, áðrenn hann fer at boða løgtingsformannin um frá, um hann leggur frá sær**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek:** Anfinn Kallsberg, løgmaður, segði, tá hann kom til samráðingarfund týsmorgunin, at nú fækka møguleikar hansara fyri at skipa samgongu. Sambandsflokkurin hevði tó ikki avgjørt, um hann vildi í samgonu ella ikki, segði løgmaður.

Løgmaður viðgekk, at verður einki burtur úr hesum møguleikanum við Sambandsflokkinum í staðin fyri Tjóðveldisflokkinum, mátti hann sanna, at tað nærkast, til hann fer at boða løgtingsformanninum frá, at hann letur samráðingarrættin frá sær.

Hinvegin vildi hann einki siga um, hvørt hann vildi royna at fáa Miðflokkin við í eina samgongu. Men hann váttaði tó, at hann helst vildi hava ein breiða samgongu.

Løgmaður segði, at hann framvegis bíðaði eftir svari frá Sambandsflokkinum, hvørt tað skuldi verða nakrar samráðingar ella ikki. Sum skiltist á løgmanni, var einki avgjørt, frá Sambandsfloksins síðu.

Anfinn Kallsberg segði, tá hann kom á fund, at formaður Sambandsfloksins, Lisbeth Petersen, hevði biðið um eitt prát týsmorgunin, og at tað var tað prátið, nú var farið til. Realitetssamráðingar vórun ongar avtalaðar yvirhøvur, segði løgmaður.

Løgmaður væntaði ikki, at nøkur samgonga fór at vera gjørd, áðrenn tingið kemur saman í dag.

– Tað er mær vitandi ongantíð hent enn, at ein samgonga er skipað eftir einum samdøgurði, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, tá hann møtti á gamla Apoteki týsmorgunin.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, ásannar, at verður eingin samgonga burtur úr royndini við Sambandsflokkinum, fara hansara møguleikar at fækka*



# Løgmaður farin í jakkan



*Løgmaður hevur fyribils givið upp og hevur latið seg í jakkan á veg til hús av Gamla Apoteki týskvøldið. Men hann væntar at koma aftur, sigur hann*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Samráðingarnar um at skipa samgongu millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvsstýrisflokkin eru slitnaðar, tí »alle ville herrer være.«**

FUNDARSLIT
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek, týskvøldið:** Sum í Grindavísuni ræður á Gamla Apoteki.. »forvirring over al maade«, nú einki spurdist burtur úr seinastu roynd løgmans at skipa eina breiða samgongu.

Tá klokkan gekk til hálvgum átta týskvøldið, lat løgmaður seg í jakkan í Fólkaflokshølunum á ovastu hædd á Gamla Apoteki. Hann fór heim at fá sær at eta, segði hann. Lagið var, sum vera man, einki serligt á honum, og heldur ikki á restini av fólkafloksmonnunum, sum staddir vóru í sama rúmi.

Í neðra sótu javnaðarmenninir í somu sinnisstøðu og tosaðu um at fara aftur í andstøðu. Lagið var stutt sagt vánaligt.

Heldur ikki í Sjálvstýrisrúminum var nakað lag. Eisini har vóru tey misnøgd við, at alt endaði í einum stríði milum størru flokkarnar um at sleppa at verða løgmaður.

Løgmaður segði við Sosialin, beint áðrenn hann fór heim, at nú vóru bara tríggir møguleikar eftir hjá honum.

Teir eru ein 16-manna samgonga, ein 17-manna samgonga, ella at lata løgtingsformanninum samráðingarrættin, sum so vildi endað við eini formansrundu.

Tá løgmaður tosar um 17- manna samgongu, roknar hann við verandi samgongu umframt Miðflokkinum.

Men um nakað so pyrst burtur úr tí, veit løgmaður einki at siga um beint nú, tí hann skal viðgera hesa støðuna innanfloks fyrst. Men hann væntar, at okkurt meira fer at henda í kvøld.

# Miðflokkurin bíðar



*Miðflokkurin fer ikki í samgongu við hvønn sum helst, sigur Jenis av Rana, floksformaður*

**Miðflokkurin er vorðin áhugaverdur á Gamla Apoteki, men beint fyri klokkan átta týskvøldið hevði eingin givið honum fundarboð, segði Jenis av Rana, floksformaður**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek, týskvøldið**: Eftir at samráðingarnar millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvsstýrisflokkin slitnaðu týskvøldið, gekk tosið á Gamla Apoteki um, at okkurt var í umbúna á miðhæddini, har Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava floksrúm.

Nakað fyri klokkan átta týskvøldið kom Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, á Gamla Apotek, og hann helt beina leið inn á gongina, har teir báðir størstu flokkarnir sótu. Tað førdi til gitingar um, at har kanska skuldi vera ein samgonga við 17 monnum undir uppsigling.

Men Jenis av Rana segði við Sosialin, at hann hevði eingi fundarboð fingið, og hevði heldur iki tikið nakra avgerð um at fara í nakra samgongu.

Hann bíðaði, segði hann, og legði afturat, at tað kom sjálvandi ann uppá, hvørjum møgulig fundarboð komu frá. Hann fór helst ikki í samgongu við hvørjum sum helst segði hann, men vildi tó ikki grundgeva nærri fyri teirri avgerðini.

– Lat okkum bara siga, at alt er opið, segði Jenis av Rana við Sosialin týskvøldið.

# Sambandsflokkurin vil hava ávirkan

**Lisbeth L. Petersen, formaður í Sambandsflokkinum, segði á Gamla Apoteki fyrrapartin týsdagin, at flokkurin vil í samgongu, tí hann vil hava ávirkan á rikna politikkin**



*Lisbeth Petersen, formaður Sambandsfloksins, sigur, at flokkurin sjálvandi vil í samgongu, so hann kann fáa ávirkan á rikna politikkin*

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek:** Lisbeth Petersen, formaður Sambandsfloksins, segði við Sosialin fyrrapartin týsdagin, at Sambandsflokkurin hevur gjørt av at royna samráðingar um eina samgongu saman við Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum.

– Vit vilja hava ávirkan á tann politikkin, sum førdur verður, og tí er eingin ivi um, at vit vilja vera við, segði hon.

– Ætlaðu vit ikki tað, høvdu vit als ikki verið her í dag, segði sambandsformaðurin í viðmerking til tað, løgmaður segði fyrr um morgunin um, at Sambandsflokkurin ikki hevði gjørt av, um hann vildi vera við ella ikki.